

**VW PASSAT TDI STATIONVOGNUR**
Árg jun.97, Km 75.000. Diesel.
Kr. 188.000.



**VW VENTO TURBODIESEL**
Árg feb.95, Km 119.000. Diesel.
Kr. 132.000.



**VW PASSAT TDI**
Árg des.94, Km 176.000. Diesel.
Kr. 95.000.



**FORD COURIER 1,8 VØRUVOGNUR**
Árg nov.98, Km 53.000. Diesel.
Kr. 84.000.



**TOYOTA COROLLA**
Árg mar.85, Km 256.000.
Kr. 32.000.



**OPEL ASTRA TD STATIONCAR**
Árg apr.96, Km 93.000. Diesel.
Kr. 100.000.

Audi SEAT

**Bilasølan v/ Øssur Johannesen**
**tel 315354 - www.audi-vw.net**



**SUZUKI ALTO 1.0 GL**
Árg okt.98, Km 23.000. Kr. 69.000.



**MITSUBISHI GALANT 1.8 SPORTING**
Árg des. 91, Km 138.500. sýnaður okt.2000. Kr. 65.000.



**FIAT SEICENTO SPORTING**
Árg nov. 99, Km 19.000.
Kr. 76.000.



**TOYOTA COROLLA STC. 2.0 DIESEL**
Árg feb. 99, Km 60.400.
Kr. 135.000.

SUZUKI
Spf. Eyðbjørn Hansen • Varðagøta 75 • 100 Tórshavn
tel 31 33 75 • fax 31 14 95 • www.suzuki.fo • suzuki@suzuki.fo

**LÝSIÐ**
**við**



**brúktum**
**bilum**
**í Sosialinum**






# – Hvat er góður dansur?

DANSUR
*Norrønafelagið*

Hvat varð hildið at vera góður dansur fyrr, og hvussu er hendan uppfatanin nú?

Hendan og aðrar spurningar fer Eyðun Andreassen, fólkaminnisfrøðingur, at viðgera í fyrilestri í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 23.januar kl.19.30.

Eyðun Andreassen sigur, at hann fer at tosa um hin føroyska dansin søguliga og nútíðarliga.

Hvaðani stavar hann, og hvussu er hann komin til Føroya.

Síðani hvat vit vita um dans í Føroyum fyrr, har nomið verður við tær heilt fáu keldurnar, ið nevna hetta evnið.

Eyðun Andreassen fer í seinna høvuðsparturin av fyrilestrinum hjá sær at viðgera sjálvan dansin. Hvat hevur verið hildið at vera góður dansur fyrr, og hvussu er henda uppfatan nú í tíðini. Her verður tosað um teir tríggjar høvuðspartarnar í dansinum: kvøðingina, kvøðingarlagið og stevið. Hvussu hesir partar eru einsæris, og hvussu teir renna saman til ta framførsluheild, ið nú ber navnið føroyskur dansur.

Norrøna felagið skipar fyri fyrilestrinum, sum er almennur. Eftir fyrilesturin er ætlanin at fara upp á gólv, er áhugi fyri tí.



*Eyðun Andreassen, fólkaminnisfrøðingur, fer á fundinum at viðgera í fyrilestri í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 23.januar kl.19.30*

## Sviar skelkaðir av óhugnaligum morði

**Sviar eru skelkaðir, eftir at ein kurdisk kvinna varð skotin í býnum Uppsala. Tað skelkandi er, at tað var faðir hennara, sum skjeyt**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Tann 26 ára gamla Fadime varð skotin mánakvøldið, tá hon var komin í føðingardag hjá systir síni.

Hon hevur verið hótt við lívinum, síðani hon fyri nøkrum árum síðani fann sær drong. Trupulleikin var, at drongurin var svii, og tað vildi kurdiski faðir hennara ikki góðtaka. Hann og familjan høvdu gjørt av, at Fadima skuldi giftast einum skyldmanni úr kurdiska partinum av Turkalandi.

Men Fadima vildi ikki gera eftir boðunum frá faðirinum, so hon rýmdi saman við svenska dronginum. Síðani hevur hon ikki havt nakað samband við familjuna, men mánakvøldið valdi hon at fara í føðingardag hjá einari systir. Tað bleiv hennara bani.

Svenska løgreglan tók stutt eftir tann 56 ára gamla faðirin, sum nú er skuldsettur fyri morð.

Ráðharrin í innflytaramálum, Mona Sahlin, sigur, at tilburðurin er enn eitt dømi um, hvussu summir innflytarabólkar liva langt burturi frá tí svenska samfelagnum.


**EDV-fólk**

**Starv í Føroya Banka**

**Spennandi og avbjóðandi starv í fyrisitingardeildini í Føroya Banka**

Føroya Banki hevur seinastu árini havt ein stóran búskaparligan vøkstur og er ein fyritreyt fyri gongdini, at tað áhaldandi verður arbeitt við at menna og viðlíkahalda EDV-økið í bankanum.

Alt bendir á, at tøkniligu avbjóðingarnar verða enn størri í framtíðini og verða alsamt størri krøv sett til bankan at laga seg til kringumstøðurnar. Í eini ásannan av, hvussu týdningarmikil partur av gongdini EDV-skipanirnar eru, verður EDV-økið í bankanum raðfest høgt.

**Starvið**

- Umsiting av netumhvørvinum í bankanum, herundir back-up og support av brúkarum.
- Gerð av útskriftum
- Gera úrdrátt úr databasuni á Elektron við t.d QMF (SQL)
- Umsiting og menning av Intraneti bankans
- Víðarimenning av heimasíðuni, herundir gerð av web-forritum
- Umsiting og menning av datawarehouse/datamarts
- Luttaka í arbeiðsbólkum á Elektron
- Aðrar ad-hoc uppgávur, ið javnan stinga seg upp í einum livandi umhvørvi

**Førleiki**

**Tann, ið verður settur:**

- Skal hava viðkomandi útbúgving ella arbeiðsroyndir innan nevndu øki.
- Skal hava góð samstarvsevnir og skal samstundis kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur fyrimun, um kunnleiki er til peningastovnsskipanir.

Vit rokna við, at tú hevur hollan kunnleika til EDV yvirhøvur og at tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj amboð innan EDV-økið. Tað er avgjørt ein fyrimunur um tú kennir til NT-umhvørvi, Lotus Notes, DB2 og SQL.

**Treytir**

Setanartreytir verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

**Umsókn**

Hevur tú áhuga at royna nýggjar avbjóðingar, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda umsókn saman við viðkomandi skjølum til:

P/F Føroya Banki
Starvsfólkadeildin
Att.: Bjarki Mohr
Postboks 3048
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 7. februar 2002.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Vestergaard ella Regin Frederiksen á fyrisitingardeildini.

FØROYA BANKI